## Jens Marni leggur leiðina til Klaksvíkar

Jens Marni Hansen er eitt heitt navn í føroyskum tónleiki í lotuni, og hann leggur eisini leiðina fram við á Summar Festivalinum. Leygarkvøldið kl. 18.45 fer Jens Marni at spala nakrar sangir av nýggju útgávuni hjá sar á Torginum á Summar Festivalinum. Aftan á framforsluna ber til at hitta Jens Marna í Telebúðini, har tað ber til at ogna sar nýggju floguna hjá Jens Marna og fáa hana signeraða. The Right Way er fyrsta soloútgávan hjá Jens Marna Hansen, og flogan hevur fingið sera góða móttoku. Á floguni eru góðir og valljóðandi rocksangir, og fleiri teirra hava verið nógv at hoyrt í føroyskum útvarpi í summar.

# egin og hesumegin vegin

ferðarvísur í 1978 og Hinumegin Ringvegin í 1991. Men eisini verður farið longur aftur, um tónleik í sekstiárunum, tá Kári legði lunnar undir sína tónleikaleið, sum partur av beattónlekinum tá, men so er tað jú eisini so, at Kári og beiggi Edvard, Per Debess, sáli, spældu í bólki saman og eisini gjørdu ógloymandi bólkin Debess og Petersen, har nógv helst kenna og hava sungið við til reglurnar; "Hetta er ein søga um eitt hús sum var blátt,...".

Kári metir, at teir mundu vera teir fyrstu, ið soleiðis leiktu tveireinir við guitarum og munnhørpu.

Venjingin fer í veruleikanum fram í barnaheiminum hjá Edvardi og Edvard sigur seg annars minnast gamlan Fender guitara hjá Kára, og Kári sigur seg enn hava guitaran. Og so kunnu teir ikki halda sær, men mugu flenna, tí Kári minnist, at tá teir sótu uppi á kamarinum hjá Peri, so kom mamman upp og bað teir dempa, tí Edvard, sum jú er nakað yngri, lá og svav.

### Upp Finnur

Teir reisast og byrja spakuliga at hygga at skránni, ið Kári hevur gjørt fyri kvøldið, og eitt og eitt ljóma kendu løgini í stovuni í Tvørgøtu. Kettan - við stórum trompetkendum kraga um høvdið, reisist úr bleyta stólinum, meðan Kári syngur um Skalla Gríms Egil, og tekur leiðina í køkin, men sæst tó seinni aftur í stovuni.

Kári syngur og spælir sín Ovation guitara, Edvard spælir stóra kontrabassin, men hevur eisini eina fótpedal, ið slær á eina tamburin, við sín høgra fót. Ein uppfinning, sum Finnur sigst hava uppfunnið, og sum teir skemta við, at Edvard hevur ment til tað hon er.

Finnur er snillingur á tangentarnar og leikar klaver og harmoniku, men vísir seg eisini sum góðan blokkfloytuleikara. Og í støðum hava Edvard og Finnur eisini lagt kórrøddir tilrættis, so Kári kann ikki annað enn hugsa um afturhvarv (orðið, sum hann á sinni smíðaði fyri nostalgi), tí tað nú mest minnir hann um kórrøddirnar hjá The Beatles.

### Sum eftir ánni

Tað skýmir so smátt, tó at góðveðrið longir um kvøldið, alt meðan klassikararnir ljóma. Nakrir sangir eru trúgvir mótvegis kendu sniðunum, meðan aðrir fáa ein ham, ið er eitt vet øðrvísi, enn útgávan hevur vant okkum við farnu 30 árini.

Løg og tekstir standa sterk, tí dygdini bilar onki. Men eisini er hugaligt, at sangur, og ikki minst guitarspælið gongur so leikandi lætt, og er gott.

Tá øll løgini eru vand, nakrir tímar farnir, og ljóðførini - og Egil, Kalli Katt og Villu Víddirnar - aftur sleppa at hvíla, tykist onnur ró at hava lagt seg yvir lítla húsið og sólstovuna.

Hetta gekk sum eftir ánni og vísusangarin, troubadoururin, sang eitt tyssi av sínum sangum, og ikki nýttist honum stativ til tekstirnar, tí teir dugdi hann. Og soleiðis skal tað vera, hóast Kári ikki sigur seg hoyra til teirra, ið hevur fingið sær politikk á økinum, eins og aðrir, ið við vilja ikki vilja síggja ella hoyra sangarar, troubadourar, ið standa og lesa tekstirnar, meðan framført verður.

Tygara útsendi takkar fyri tónleikin, løtuna,og møguleikan at vera 4. maður til venjing í hesi trio, ið ljóðar sum ein størri bólkur, og leitar sær út í kvøldarmyrkrið.

Glaður fyri at hava upplivað hesa venjing, ið gekk fyri seg mitt í Havn - hesumegin ringvegin - og tó er tað sum at koma úr heilt øðrum heimi, og aftur venja seg við veruleikan, har Kalli Katt strevast og fólk gerast vísmenn, tá tey fylkjast í flokk, og eru nokk.

Og ongin ivi er um, at fólk savnast og eru nokk, tá Kári fer á pall leygarkvøldið í Klaksvík.









